FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

1. oktober 2024
Mál: 24/20947-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-025/2024

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-025/2024 frá Steffan Klein Poulsen, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fiskivinnu- og samferðslumálum, Dennis Holm, um asfaltering í tunlunum Norður um Fjall

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu gongur at asfaltera vegirnar í og uttan fyri nýggju tunlarnar Norður um Fjall?

2. Hví eru fleiri vegastrekki í hesari verkætlanini asfalterað av nýggjum?

3. Er undirlagið (vegkassin) nóg væl gjørt?

4. Hvat fyri grót (tilfar) er brúkt sum undirlag til vegirnar í hesari verkætlanini?

5. Kann landsstýrismaðurin tryggja borgarunum, at vegirnir eru nóg væl gjørdir, og at teir fara at halda í eitt nøktandi tíðarskeið, tá ið verkætlanin verður endaliga avhendað?

Svar til spurning 1 og 2
Vegurin í Ánunum og vegurin í Árnafjarðartunlinum eru asfalteraðir eina ferð við bindilagi, og ætlanin er, at slitlagið verður lagt á seinni í ár. Asfalteringin er tá liðug á hesum vegum.

Vegurin í Árnafirði, sum er millum tunlarnar, og vegurin í Hvannasundstunlinum eru ikki asfalteraðir enn, meðan vegurin millum tunnilsmunnan Hvannasundsmegin og Depil, skamt frá bygdini, í støðum er asfalteraður eina ferð og annars tvær ferðir.

Arbeiðið hevur sum heild gingið væl. Tó hava trupulleikar verið á ávísum pørtum av vegnum í Ánunum og á Depilsvegnum, har asfaltið er sprotnað, og undirlendið hevur givið seg. Hesir partar av vegastrekkinum eru gjørdir av nýggjum. Øll asfaltering verður eftir ætlan liðug seinni í ár, tá verkætlanin eisini verður endaliga liðug.

Svar til spurning 4
Meginparturin av vegunum er bygdur upp av tunnilstilfari frá verkætlanini, meðan ein lítil partur er innflutt tilfar.

Svar til spurning 3 og 5
Landsverk metir, at undirlagið er væl gjørt, og at vegurin fer at bera alla ferðslu, tá hann er liðugur.

Áðrenn tunlarnir Norður um Fjall verða avhendir um ársskiftið, verður øll verkætlanin, tað vil siga tunnilsgerð, vegagerð og el-arbeiði, endaliga eftirkannað til tess at tryggja, at verkætlanin lýkur ásett sáttmálakrøv.

Dennis Holm
landsstýrismaður